UPPTAKT TIL FÓTBÓLTIN S. 11-13

tíðindablaðið sosialurin

7,-

Nr. 162 * leygardagur/sunnudagur 28./29. august 1993

# Bretsk pirat-herferð móti Føroyum

**– Hetta er ikki ein spurningur um vanliga ránsveiðu, sum kann avgreiðast í Føroya rætti. Málið er so týdningarmikið, at tað kann einans viðgerast á hægsta politiska stigið, heldur Carsten Høgh, ovasti á Marinustøðini, um ólógligu bretsku framferðina suður av Munkagrunninum í gjár, tá eitt amerikanskt rannsóknarskip ólógliga gjørdi seismiskar kanningar á føroyskum sjóøki**

Nógv bendir á, at ein álvarslig diplomatisk kreppa er við at taka seg upp millum Føroyar/Danmark og Bretland. Hetta bendir bert ein mánað, áðrenn fundur skal vera millum føroyingar og bretar um markið.

Í gjár kom danska sjóverjuskipið Hvidbjørnen fram á amerikanska oljurannsóknarskipið "Acadian Searcher", sum gjørdi seismiskar kanningar 9 fjórðingar inni á føroyskum sjóøki norðan fyri Gráu leiðina.

Marinustøðin sigur frá, at skipið arbeiðir fyri bretska felagið, "Digicon Exploration Geofysical". Skipið hevur til uppgávu at gera seismiskar kanningar við tí fyri eygað at leita eftir olju í økinum.

Carsten Høgh, leiðari á Marinustøðini sigur, at teir hava verið í sambandi við skiparan, sum hevur greitt frá arbeiðsprogramminum. Og samsvart tí skulu teir gera kanningar inni á føroyskum øki, uttan at

Framhald á síðu 17



*Carsten Høgh, marinuovasti – Slíkt virksemi eigur at verða steðgað alt fyrí eitt. Mynd kalmar*




*Hvidbjørnen hjá donsku sjóverjuni, ið rak amerikanska skipið út úr føroyskum øki í gjár. Mynd kalmar*

*Framhald av síðu 1*
teir tó vita av, at talan er um føroyskt øki.

Talan er um føroyska fiskiøkið, sum eisini fevnir um búskaparliga økið. -Hetta er avgjørt føroyskt øki sigur Carsten Høgh.

-Men hvussu ber tað til, at skiparin á einum slíkum skipi ikki veit, at hann er inni á føroyskum øki?

-Tá hann hevur fingið eina arbeiðsætlan, sum er góðkend av bretskum myndugleikum, er hann í góðari trúgv.

Skipið fekk alt fyri eitt boð um at fara úr føroyskum øki.

Upp á fyrispurning hví teir ikki tóku løgdu hald á skipið sigur ovastin á Marinustøðini, at hetta er ein spurningur, sum eigur at viðgerast á hægsta uttanríkispolitiska støði. Hetta er eitt so álvarsligt mál, at tað eigur ikki at verða avgjørt ein einstakan fyrrapart í rættinum í Havn.

-Slíkt virksemi eigur at verða steðgað alt fyri eitt sigur Carten Høgh. Hann heldur ikki, at tað tænir nøkrum endamáli, at bretar finna fram til, hvat er til av olju á føroyskum øki, serstakliga ikki nú báðir partar skulu til at samráðast um markið.




Skipið hevur verið á føroyskum øki í eitt samdøgur og varð júst byrjað kanningarnar. Øll seismiska útgerðin var í sjónum, tá Hvidbjørnin kom á staðið. Carsten Høgh heldur ikki, at skipið hevur fingið nógvar upplýsingar, nú tað hevur verið so stutt í økinum.

Marinustøðin hevur annars eitt sera neyvt eftirlit við øllum, sum fer fram í umrødda øki og Høgh kommandørur dylur ikki fyri, at tann nógva umrøðan av møguligum oljukeldum í økinum ger, at teir fylgja sera væl við, hvat fer fram har.

-Nú tað verður so nógv tosað um møguleikarnar at finna olju í føroysku undirgrundini haldi eg tað er umráðandi, at vit hava sera neyvt eftirlit við øllum tí, sum fer fram á føroyskum øki sigur Carsten Høgh.

Í landsstýrinum meta tey málið sera álvarsligt. Samband er við donsku myndugleikarnar. Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóri sigur, at er tað so, at bretar hava gjørt seismiskar kanningar á føroyskum øki, so er hetta eitt greitt brot á allar rættarreglur. Er tað so, at kanningarnar eru gjørdar í tí økinum, sum báðir partar gera krav uppá báðumegin miðlinjuna, so skulu føroyingar eisini geva loyvi til tess. Og landsstýrið hevur ikki givið nakað slíkt loyvi sigur Kjartan Hoydal.

jan


# GOTT BINGO

verður í
Bygdarhúsinum í Hósvík
sunnudagin kl. 16.00.

Nógvir góðir vinningar.
1/2 krov til aðru hvørja fulla plátu.
10 vinningar á lutaseðlinum, m.a. gávukort á 1.000 kr. verður burturlutað.

Bygdarfelagið VARÐIN

## Varaleiðari

Søkt verður eftir varðaleiðara við pedagogiskan útbúgving til Barnagarðin við Velbastaðvegin, at byrja sum skjótast, seinast 01.10.93.

Starvið er fulltíðarstarv.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Umsókn skal stílast til nevndina fyri Barnagarðinum við Velbastaðvegin.

Umsóknarfreistin er 15.09.93. Skikkaður umsøkjari er til starvið.

Barnagarðurin við Velbastaðvegn
100 Torshavn

## Frá Bridgehúsinum

### Einstaklingakapping

verður leygardagin 28.8., kl. 15 í »Húsinum«.

Tilmeldan í seinasta lagi sama dag kl. 13 á tlf. 18721, 19142 ella Johannes tlf. 15836

# KALLKYN

RIMMAR ÚTSØLA

BYRJAR MÁNADAGIN 30.08. KL. 9[00]

ALT tað gamla skal út!
÷10% verða latin av tí nýkomnu vøruni

KALLKYN Tórsgøta 11 Tlf. 16206

MOTOROLA
450 900 MHZ NMT



FARTELEFONIR
Storno
Handan Á 6 · Tórshavn
Tlf. 14414 · Fax 18045

Hygg her!

Alt arbeiði og søla av hita, saniteri, vatnleiðingum, kloakkum og annað jarnsmíð, so sum:
- portur
- rør pelar
- toysnórar
- og mangt annað

Fa. Jóanes F. Dahl
Norðskála
Tlf. 22274 og 86274


*Framhald av síðu 5*
væl, og havi gott samband við allar fakbólkar og starvsfólk á Studentaskúlanum, so eg eri sannførdur um, at tað skal ganga væl.

- *Ætlar tú at broyta arbeiðsgongdina í rektaraessinum?*

- Arbeiðsgongdin á slíkum skúla er løgd til rættis, og tí verður einki radikalt stig tikið frá mínari síðu júst nú.

- Vit hava góðar, væl útbúnar lærarar á skúlanum, og tí veit eg, at tað kann eydnast at fáa skúlan at virka. Eg vóni tó, at eg so sum rektari kann ávirka ymisk viðurskifti til tað betra, sum fráliður.

- *Torført hevur verið at fingið játtanirnar at halda á Studentaskúlanum. Hvat verður gjørt við hetta komandi árini?*

- Tað hevur verið serstakliga torført at fáa játtanina og næmingatalið at fylgjast seinastu árini, og hetta hevur eisini verið stóra stríðið hjá teimum rektarum, sum hava sitið undan mær.

- Eg vóni bert, at játtanin í framtíðini verður meira realistisk, enn undanfarnu árini, sigur Mads A. Winther.

Royndarskeiðið hjá nýggja rektaranum er tvey ár, men Mads A. Winther er sannførdur um, at hann ikki bert verður rektari í tvey ár.

550 næmingar ganga á studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum, og umleið 50 lærarar umframt onnur starvsfólk arbeiða á skúlanum.

Dagny